# Johan Evensen var ein framburðsmaður

Tað vóru bert tvey av børnunum hjá Onnu og Jens Christian, sum búsettust í Føroyum, nevniliga Andreas og Johan. Av teimum er tað bert Johan, sum eigur eftirkomarar í Føroyum. Meðan tað er nógv skrivað um Andreas, so er minni skrivað um Johan. Hann var eisini ein merkismaður.

Johan Evensen varð vanliga kallaður Spinnarin. Hann hevði spinnaríið við Sandá. Tað var bygt yvir sjálva ánna og kundi nýta orkuna í fossinum. Hetta var eitt sera framkomið hugskot fyri nærum 100 árum síðani.

Í 2003 hevði FF-blaðið samrøðu við Elsebeth Christinu Wang f. Simonsen úr Hoyvík, vanliga kallað Ebba, sum hevði arbeitt hjá Johan sum ung genta.

Í september 1931 fór hon 16 ára gomul at arbeiða hjá Johan Evensen. Hann var føddur í 1881 og hevði 50 ára føðingardag, beint eftir, at Ebba var komin hagar. Jacob Lützen, mammubeiggi Johan, innrættaði spinnaríið í Rættará í 1903, og Johan skuldi blaðungur standa fyri spinnarínum. Jacob og sonurin, Valdemar Lützen, góvust í 1908. Johan keypti alla útgerðina og bygdi virkið við Sandá, og tað var tá, at hann fór at nýta vatnorkuna.

Johan hevði verið trý ár í Týsklandi og hevði útbúgvið seg sum spinnara har. Mannfólkini, sum arbeiddu á spinnarínum, vóru Johan, Edvard Samuelsen, ættaður úr Horni í Havn, og Mortan á Argjum. Restin var konufólk. Elsebeth Christina hevði avgreiðsluna um hendur. Men henda gekk fyri seg á gamla hospitali, sum Johan átti, og har hann búði.

M.a. skuldi Elsebeth Christina skriva øll postuppkrøv. Alt varð sent við postuppkrav, um ikki annað var avtalað. Hon skuldi eisini bera umsorgan fyri, at posarnir við ull vóru væl og virðiliga merktir, so teir kundu koma aftur til sín rætta eigara. Tað var ikki lukkuligt, um hetta ikki varð gjørt. Men tað kom sera sjáldan fyri, at merkingin hvarv. Ull kom allastaðni frá í landinum, so tað var eisini nógv at halda skil á.

Ullin skuldi eisini skiljast og turkast. Hon kundi turkast úti, men vóru ikki líkindi til tess, kundi hon viðhvørt verða turkað uppi á loftinum undir væðingini á gamla hospitali, áðrenn hon við hestavogni ella seinni bili varð koyrd út til spinnaríið at verða spunnin.

## Eisini veving

Umframt at spinna varð eisini vovið. Hetta var gjørt í 3-4 ymiskum kvalitetum, sum vóru frá fínum til minni fínt. Hetta var tweed, ið var tiltikið fyri vakran lit. Toyið varð sent niður til Danmarkar at tøva og farga. Tá tað kom upp aftur, var tað klárt at verða selt. Hetta virksemið steðgaði annars, tá sambandið við Danmark varð kvett í 1940.

Elsebeth Christina hevði fingið greið boð um, hvussu hon skuldi avgreiða kundarnar, tá teir komu at keypa tilfar til buksur. Var tað til stuttar buksur til stóran mann, skuldi nýtast 1,1 metur av klæði. Til ein miðal mann kravdist 1 metur, og til lítlan mann 0,9 metur. Til einar langar buskur skuldi 0,25 m leggjast afturat. Johan legði saksin á borðið, og nú var tað ábyrgdin hjá Ebbu at klippa. Elsebeth Christina var í fyrstuni bangin fyri at klippa skeivt, men hetta bilaði ongantíð.

## 30 krónur um mánaðin og weekend

Elsebeth Christina búði heima hjá Johan og Berghild, sum var systir Petur Mohr Dam. Hoyvík var jú langt burturi. Hon fekk fullan kost og 30 kr. í løn um mánaðan. Tað var als ikki so galið tá. Johan og Berghild áttu Onnu tá, og seinni varð Johan føddur í 1935. Elsebeth Christina var fyri ein part eisini arbeiðskona heima hjá teimum. Tað kom eingin við ull um summarið, men um heystið var nokk at gera.

## Jóan Karl var góður nokk

Ein maður kom ein dagin at keypa klæði til buksur. Hann spurdi eftir Evensen. Elsebeth Christina pakkaði inn, og segði hvat tað kostaði. Maðurin hevði verið á útróðri og hevði ikki pening uppi á sær. Men Elsebeth Christina hevði fingið boð um bert at lata út, um hon fekk peningin í hondina. Men maðurin segði, at beint nú lá tað altso fyri hjá konuni at seyma buksurnar, og tað kundi ikki klárast, um hann skuldi heim eftir peningi fyrst. Elsebeth Christina var rættiliga í døpurhuga. Hon hugdi uppá mannin. Hann sá ikki óskikkiligur út, so hon letur hann fáa klæðið. Og hon fær at vita, at navnið var Jóan Karl av Skála, kendur útróðrarmaður.

Evensen kom seinni og fekk søguna. Elsebeth Christina segði sum var. Maðurin sá út til at vera erligur! Tá flenti Evensen og segði, at Jóan Karl á Skála var góður nokk.



Systkinabørnini Johan Evensen og Bodil Davidsen vitjaðu í 2003 Bregninge, har tey eisini vóru á grøvina hjá ommuni og abbanum. Millum tey stendur Dorte Lindskov Weiss, sum saman við Esther Djurhuus eigur heiðurin fyri, at henda søgan er komin fram



Anna og Jens Christian liggja saman við dótrini Elisabeth grivin við kirkjuna í Bregninge

Eina tíð hevði Evensen danskan skræddara, sum m.a. seymaði klæðningar. Evensen spurdi Elsebeth Christinu, um hon kundi koma og seyma fóður, og tað gjørdi hon.

Elsebeth Christina letur væl at Johan Evensen og eisini konuni Berghild. Tey vóru stás fólk. Her fekk hon nakað so forkunnugt sum weekend, og tá slapp hon heim til Hoyvíkar. Víst var tað ikki fyrr enn leygarkvøld, men kortini...

## Var framburðsmaður

Johan var ein framburðsmaður og hevði eisini aðrar

### Børnini hjá Onnu og Jens Christian Evensen. Umframt Jens, sum doyði heilt lítil, vóru tey:

**A.** Andreas Christian, sera kendur prestur og próstur, f. 6.12 1874. Fyrra konan var Nelly Engelsted. Tey vóru barnleys. Seinna konan var Kristine Sofie Joensen f. 17.9 1885. Tey fingu børnini Tórarin, Rannva, Gunnhild, Jens Kári og Arnóra.

Í 1903 varð fyri fyrstu ferð prædikað varð á føroyskum í kirkju. Tað var, tá A. C. Evensen fekk loyvi úr Kirkjumálaráðnum at prædika á føroyskum í Skopunar Kirkju, eftir at skopuningar í 1902 høvdu savnað undirskriftir við áheitanini.

122 av 146 skopuningunum skrivaðu 122 undir.

6. mars 1902 gava danska kirkjumálaráðið Andreas Christian Evensen loyvi til at prædika á føroyskum, og tann 20. apríl sendi Fríðrikur Petersen, próstur, loyvið suður til A. C. Evensen. Óvist er tó, hvønn dag, prædikan varð hildin, men skopuningar meta, at tað hevur verið sama várið.

A. C. Evensen tók embætisprógv í 1901 og tók við presta-embætinum á Sandi í 1902. Hetta starv røkti hann, til hann í 1917 var tilnevndur Føroya Próstur, tá Fríðrikur Petersen doyði. Men honum untist bert fáar mánaðir í embætinum, tí hann doyði 21. oktober í 1917.

**B.** Elisabeth Frederikke f. 12.6 1877. Hon giftist við Søren Sørensen, lærara og organistur í Bregninge, hagar foreldrini fluttu, tá ið tey fóru úr Føroyum. Søren var einkjumaður við fimm børnum. Tey fingu í 1914 sonin Jens, sum gjørdist gartnari i Assistence kirkjugarðinum í Keypmannahavn. Hann var giftur, men tey fingu ikki børn. Abbabørn hjá Søren Sørensen hava góð ummæli av Elisabeth, sum helst er jarðað saman við foreldrunum.

**C.** Frida Frederikke f. 2.6. 1879. Hon giftist við systkinabarninum Johan Evensen, og hann var kolonistjóri í Grønlandi, sum fyrr umrøtt. Teirra børn vóru Elisabeth, Aage, Vagn og Gudmund.

**D.** Johan Edvard f. 2.10 1881.

**E.** Johannes Ewens f. 22.2 1885. Giftur við Juttu Mary Bruun f. 23.10 1886. Fingu børnini Leif og Inga Signe. Hann var høvuðsgrannskoðari í danska Landbúnaðarráðnum.